HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

Hotel Vágar í
FØSTULÁVINTSHÝRI

friggjadagin 8. febr.
og leygardagin 9. febr.
frá kl. 17.00

Vit bjóða:

Forrættur:
Dampað reyðtungurulla við sitrónbakaðari øðu á spinati við kryddróma

Steik:
Léttstokt lambafilet við hvítum bønum, pommes risolet og ingifersoð

Omaná:
Dessertskál við ísi, frukt og køku

2 rættir 155,-

3 rættir 175,-

Leygardagin 9. febr. verður danska Melodi Grand Prix'ið víst á stórskíggja

Bíleggið borð á tel 33 29 55

Vikuskiftisuppihald fyri hvønn ..... bara 250,-

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 - FAX 33 23 10 - T-Postur: hotel@ff.fo

Nýggj sólmiðstøð við lágum prísum






ÚTBJÓÐING!

av vaskingini av trægólvunum í skúlanum á Velbastað

Kirkjubøar kommuna bjóðar við hesum vaskingina av trægólvunum í skúlanum á Velbastað alment út til áhugaði at røkja.

Vaskingin fevnir um 245 fermetrar av vanligum trægólvi í skúlanum eftir nærri ávísing frá kommununi m.a. viðvíkjandi slag av sápulúti.

Í fyrsta umfari skal vaskast 1 ferð um vikuna, helst fríggjadag, men kommunan tilskilar sær rætt at fremja broytingar hesum viðvíkjandi eftir nærri avtalu partanna millum.

Tilboð samsvarandi hesi útbjóðing skulu stílast
til Kirkjubøar kommunu, 176 Velbastað og verða kommununi í hendi í seinasta lagi 25. februar 2002 kl. 16.00

Kirkjubøar kommuna tilskilar sær rætt til frítt at velja ímillum innkomin tilboð ella vraka tey øll.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna á Velbastað á tel 328106, Annfinn Brekkstein, borgarstjóra á tel 215800 ella Petur Juul Jacobsen, skrivara á tel 226458

KIRKJUBØAR KOMMUNA

veitst tú ikki tað?

SØLUFÓLK!

Kervi søkir eftir sølufólki at byrja skjótast tilber.

Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Løn og treytir verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Vit vænta, at tú ert ágrýtin dugnalig/ur og dugur at veita viðskiftafólkum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein fyrimunur um tú hevur áhuga fyri teldum og tí sum har til hoyrir.

Hevur hetta tín áhuga kanst tú senda eina skrivliga umsókn til:

Kervi sp/f
Postboks 3202
Heykavegur 2
FO-110 Tórshavn

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **22. februar 2002**

Um tú hevur hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja 350300 og spyrja eftir Óla Olsen

KERVI
teld & tøkni
Heykavegur 2, P.O. Boks 3202, FO-110 Tórshavn
tel 350300, fax 350301, e-mail:info@kervi.com, www.kervi.com

Bókhaldstrupulleikar?

Vit átaka okkum bókhaldsarbeiði fyri fyritøkur og stovnar

Hetta umfatar m.a. hesar uppgávur:

- Fíggjarbókhald
- MVG uppgerð
- Fakturering
- Debitorrøkt
- Kreditorrøkt

Áhugað kunnu venda sær til:
Knút P. Jacobsen á tel 350 300 ella tel 228 486

KERVI
teld & tøkni
Heykavegur 2, P.O. Boks 3202, FO-110 Tórshavn
tel 350300, fax 350301, e-mail:info@kervi.com, www.kervi.com

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

www.sosialurin.fo

Vikuskifti

Nr. 28 • leygardagur • 9. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Stór upptakt til danska tónleika Grand Prix



Lesið síðu 6, 7, 8 og 12



*Dagarnir líða og skjótt kemur mánadagurin, ið óivað ikki bert børnini í Dagstovninum á Argjum bíða spent eftir.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# – Eg gleði meg so nógv til føstulávint

## Grýluskortar, tunnur, kattakongur, sangir, bomm, kettur, og síðst men ikki minst føstulávintsbollar. Alt hetta kunnu børnini í Dagstovninum á Argjum gleðast yvir teir næstu dagarnar

FØSTULÁVINT

*Jóna Thomsen*
*Birita Simonsen*

Í Dagsstovninum á Argjum sita børnini spent og bíða eftir føstulávint. Tey gera ymiskt til føstuna. Summi sita og klippa grýluskortar. Her verður bæði klipt Batman, kettur og røvarar úr nógvum føgrum litum. Tey 4 - 5 ára gomlu børnini syngja ymiskar sangir fyri okkum, grýlumamma, grýlupápi og lítla grýlubarnið o.s.fr. Eisini verður gjørt kakao og føstulávinstbollar. Summi børn mála tunnuna, ið verður sligin mánadagin 11. februar. Tunnan verður prýdd við eini kettu og nógvum ymiskum litum. Fyrr í tíðini varð ein ketta koyrd inn í tunnuna, síðan varð tunnan við kettuni sligin niður. Vit vita nokk øll, at tað er ikki júst soleiðis tað gongur fyri seg í dag. Her í dagstovninum verður pappír koyrt í tunnuna. Mánadagin, tá tunnan verður sligin, ætla dreingirnir at lata seg í sum Batman, meðan genturnar vilja vera klovnar, kettur og prinsessur. Tann, ið slær tað síðsta av tunnuni niður, verður kattakongur, og fær tí eina krúnu.

- Tá vit sláa tunnu heima, koyra vit altíð bomm og pengar í hana, tað er ordiliga stuttligt, sigur Magni Abrahamsen, ið er 6 ára gamal.

- Tað stuttligasta við føstulávint er at sláa tunnu, tí tá verði eg næstan altíð kattakongur, sigur 6 ára gamli Teitur Hvidbro. Øll hini børnini eru samd við honum.

- Men tað er eisini stuttligt at ganga grýlu, tí tá fáa vit nógv bomm, siga Súsanna Jacobsen og Elsa Splidt Jacobsen, ið eru seks ár.

Dagarnir líða og skjótt kemur mánadagurin, ið óivað ikki bert børnini í Dagstovninum á Argjum bíða spent eftir.